

- *Tilhaldið hevur givið pensjónistunum ein kærkomnan møguleika at koma saman til fjøltáttaða samveru í hugnaligum umhvørvi, segði Heðin Mortensen í røðu síni*

Tilhaldið sjey ár á baki:

# Staðið har øll kunnu koma og fara

– Mítt ynski er, at samstarvið millum kommununa og Tilhaldið kemur at styrkjast enn meira, okkum øllum at gagni, tí virksemi, sum er her í Húsinum, er eitt stórt, týðandi sosialt og fyribyrgjandi arbeiði, sum ikki kann og ei heldur skal verða undirmett segði Heðin Mortensen, borgarstjóri, tá hann um grækarismessu tíð var boðið at vera gestarøðari á 7 ára føðingardegi Tilhaldsins í Havn. Vit prenta røðuna hann helt henda dagin

**FØÐINGARDAGUR**

Fari fyrst at takka fyri, at eg eri bjóðaður í 7 ára føðingardag í Tilhaldinum í dag.

Eg havi fingið áheitan um at vera gestarøðari í ár, og lat meg alt fyri eitt siga, at eg eri ógvuliga fegin um at hava fingið hesa áheitan, tí tá eg áður havi verið her, eri eg altíð farin ríkari heimaftur. Her hevur altíð verið hugnaligt at koma, og stórur blíðskapur verður vístur einum. - Stóra tøkk eiga tit fyri tað.

Tilhaldið hevur givið pensjónistunum í býnum ein kærkomnan møguleika at koma saman til fjøltáttaða samveru í hugnaligum umhvørvi, soleiðis sum tað eisini stendur í endamálsorðingini fyri Húsið.

Ja, til ber at siga, at tað er blivið ein lívstílur hjá mongum at støkka inn á gólvið til eitt prát ella til eitt av teimum mongu fjølbroyttu tilboðunum, ið eru hvønn dag í vikuni.

Sigast má, at tað var eitt ótrúliga gott hugskot, sum var sett í verk á grækarismessu í 1998, tá dyrnar fyrstu ferð lótu upp í hesum prýðiliga húsi, sum næsta ár verður 100 ár.

Vit eru teimum kvinnum og monnum takksom, sum tóku stig til at fáa eitt Tilhald í býnum, tí staðfestast kann, at okkara pensjónistar hava tikið húsið til sín frá fyrsta degi av.

Tíðliga ein morgunin í góðveðrinum fyri viku síðani, áðrenn býurin av álvara vaknaði, og dagsins uppgávur lógu á borðinum og bíðaðu, sat eg og las bløðini á skrivstovu míni á Vaglinum. Eg steðgaði á við eina av hesum áhugaverdu greinunum hjá Birgari Johannesen, sum hann kallar "Havnar leksikon".

Henda dagin hevði hann tvær myndir í blaðnum av umhvørvinum norðan fyri Føroya Banka. Onnur myndin var tikin í 1955, meðan hin var tikin í februar í ár. Myndirnar vístu, hvussu býarmyndin er broytt seinastu 50 árini. Men "selju-rønn træið" stendur enn í Steinagøtu, og har hevur tað staðið síðani 1912, skrivar Birgar.

Henda myndin og nógvar aðrar hjá Birgari fingu tankar mínar á flog henda snimma góðveðursmorgun - einsamallur í ráðhúsinum - Eg fór at hugsa um dreingja- og unglingaárini, tá vit høvdu allan býin sum spælipláss.

Eg sá fyri mær Tórsgøtu, sum var onnur høvuðs-handilsgøtan í býnum tá. Hin var eystanfyri, frá Kongabrúnni og niðan móti Sjónleikarhúsinum.

Í mínum hugaheimi var eg í Tórsgøtu og her umleiðir við øllum tí nógva og fjølbroytta virkseminum, ið fyrr var.

Har komu fram í minnið handilin hjá Heinesen, sum seinni bleiv handil hjá Valdemar Lützen. Sjómansheimið og kjøtbúðin hjá Jens Reinert. Har var Vaskaríið og Reinsaríið.

### Arbeiðsdrongur á Fjøðurreinsarínum

Eg sá fyri mær longu bíðiraðina uttanfyri Meiaríið, har vit stóðu við hvør síni mjólkaspann og bíðaðu. Handilin hjá Lamba-Jóannes, har Ebba og Niels Mortensen seinni fóru at selja gardinur og klæðir. Posthúsið, Maria Poulsen og Herluf Arnason.

Á horninum við Sverrisgøtu, Frants Restorff og kjøthandilin hjá Heina í Kjøt, har Lítli seinni fór at selja sínar døgverðar. Handilin hjá Viggo Dal-Christiansen. Frelsunarherurin og so hesi húsini hjá Føroya Banka.

Fram í minnið kom eisini Hjalmar Jacobsens, bókhandil, Karl hjá Vága-Heina og handilin hjá Demmus. Har vóru skómakarar, bakarar, barberar, smiður og nógv, nógv onnur fólk og handlar.

Tankarnir leitaðu eisini oman í Vágsbotn, sum tá í tíðini hevði eitt yðjandi lív frá snimma á morgni til seint á kvøldi. Har komu fólk úr øllum Føroyum á land við ferðabátunum, og har var somuleiðis nógv vøra umskipað.

Mjólkabátarnir komu og fóru, og smábátarnir seldu fisk. Hetta er alt ein horvin havnarmynd, treyðugt so, smábátarnir selja enn fisk og fugl í Vágsbotni.

Sum smádrongur og hálvvaksin minnist eg, hvussu hugtakandi, men ikki vandaleyst, tað kundi vera niðri í Vágsbotni, tá rættiligur uppgangur varð, áðrenn eystari brimgarður varð longdur.

Og eg ivist ikki í, at onkur, sum er her í dag, veit onkra "góða" at fortelja frá tíðini, tá ið Vágsbotnur var ferða- og handilsmiðdepilin í Havn.

Í bókini „Handan fyri havið - býurin og bygdin" skrivar skaldið Magnus á Kamarinum einastaðni:

At hann sá myndir daga undan, kendar og kærar ímillum. Hann hugdi aftur í tíðina, har lá alt so raðið. Vøllurin og Tinghúsið og Vaglið, Apotekið og Bókhandilin og Kirkjan. Sjómansheimið og Grótgarðurin og Áin og Kioskin og Áarvegurin og Skúlin, sum onkur hevði sagt um, tá hann var liðugt bygdur seinast í 1800-talinum:

„....jú, nú hava vit ein skúla, sum er eitt framstig og eitt prýði fyri býin, og so rúmur, at okkum ikki nýtist at byggja nakran skúla tey næstu hundrað árini!"

Og har lá Meinigheitshúsið og Posthúsið. Meiaríið, har hin gamli Jensen gekk so stokkdeyvur við einum røri, sum hann stakk inn í oyrað, tá hann varð noyddur at hoyra okkurt, og uppi á trætrappuni vestanfyri stóð Ki, bøkjarin, í bláari húgvu og jakka. Og har kom meiarist Jensen, altíð so fryntligur og brosandi og upplagdur og vældæmdur. Og har niðri lá Vaskaríið, har sum hann seinni, eins og hjá Lützen og í Bókhandlinum, arbeiddi sum býdrongur.

Soleiðis skrivar Magnus, og væl ber til at fylgja honum á ferð hansara í miðbýnum.

Hóast tað í dag ikki eru nøkur tekin um, at várið er hondum, nú fjøllini eru kavaklødd og bítandi kalt er í veðrinum, so sigur álmanakkin, at í morgin er grækarismessudagur.

Men eitt er, hvat álmanakkin sigur, annað er, at vit øll merkja, at dagarnir eru munandi longdir síðani stytsta dag.

Í morgin hava vit grækarismessuhald kring alt landið, har vit ynskja tjóðfugli okkara vælkomnum aftur á klettarnar.

Skótar ganga skrúðgongu og røður verða hildnar. Her í Havn er Havnar Hornorkestur eisini altíð til reiðar at seta sín hátíðarliga dám á dagin.

Vit fegnast um, at tjaldrið og